# Fýra barnabøkur og ein ungdómskrimi

**Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út smábarnabókina** *Fyrstu túsund orðini*, **barnabøkurnar** *Mín lítla kanin* **og** *Froskaslottið*, *Andafjakkari* **til størri børn og ungdómsbókina** *Kill*.

NÝGGJAR BØKUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
















*Fyrstu túsund orðini* eftir Amery og Cartwright er spennandi mynda- og orðabók við túsund orðum um alt ímillum himmal og jørð. Pauli Hansen týddi úr enskum. Til tey smæstu kann hon brúkast sum tosi- og peikibók, men hon kann eisini brúkast sum orðabók hjá størri børnum.

Bókin er 64 bls., innbundin og við myndum til hvørt einstakt orð.

*Mín lítla kanin* eftir Sue Porter er um eina so ógvuliga fitta kanin, sum dámar væl at gera skálkabrøgd. Men mamman og pápin eru so ógvuliga góð við lítlu kanin. Marna Jacobsen týddi úr enskum. *Mín lítla kanin*, sum er væl egnað til tey 4 til 6 ára gomlu, er 28 bls. og innbundin.

*Froskaslottið* eftir Jostein Gaarder er um Kristoffur Poffur og vættrina Umpin og teirra ævintýrligu upplivingar á froskaslottinum, har alt letur seg gera. Hetta er ein søga um ein drong, sum í dreymaliki roynir at sættast við saknin eftir abban, sum er deyður. Laura Joensen týddi úr norskum.

*Froskaslottið*, sum er væl egnað til tey 7 til 10 ára gomlu, er 106 bls., innbundin og við vøkrum myndum.

*Andafjakkari – Krýnikur úr døkkari fortíð 2* eftir Michelle Paver er onnur krýnikan um Torak. Lesarin fer við honum eina spennandi ferð gjøgnum skógin til Kópaoyggjar. Torak skal finna orsøkina til, hví veiðidýrini øll hava fingið herviliga sjúku. Í loyndarfullu Kópaoyggjunum avdúkar Torak eitt svik, sum fer at broyta lív hansara fullkomiliga. Bergur Rasmussen týddi úr enskum.

*Andafjakkari*, sum er væl egnað til tey 11 til 13 ára gomlu, er 278 bls. og heft við klaffum.

*Kill* eftir Mats Wahl er triðja søgan um Harald Fors, ein politist, sum roynir at fáa greiðu á brotsgerðum, har børn og ung eru bæði brotsgerðarmenn og offur. Nógv umrødda bókin snýr seg um tá tað, sum ikki eigur at henda, verður veruleiki ein dagin á Víkingaskúlanum. Ein skjútti stendur goymdur á einum vesi og fer at skjóta beint inn í matsalin. Ein køkshjálp og næmingar verða raktir. *Kill* er ein spennandi ungdómsbók um ungfólk og harðskapin, sum er í samfelagnum, men sum vit helst ikki vilja kennast við. Fyrru bøkurnar um Fors eru *Hin ósjónligi* og *Hevnd*. Jákup í Skemmuni týddi úr svenskum. *Kill*, ið er 264 bls. og heft við klaffum.

**Ítróttarsosialurin**
**– vit eru har tað hendir**

## Konan fær telduna

**Vinnarin av Sudoku-kappingini í apríl mánaði gjørdist Bergur Stórhamar úr Trongisvági**

Talan var ikki um hissini vinning, sum varð drigin, nú vit her í blaðnum skuldu finna apríl-vinnaran av framhaldandi Sudoku-kappingini her í blaðnum.

Ein spildurnýggj fartalda frá Formula-Føroyum stóð upp á spæl, og skal metast eftir rúgvuni við loystum uppgávum, so vóru tey fleiri, sum vildu hava ein møguleika at vinna hesa.

Hepni vinnarin gjørdist Bergur Stór-hamar úr Trongis-vági, og hann var sum so ikki í iva um, hvussu vinningurin skal nýtast.

– Tað er konan, sum hevur loyst flestu uppgávurnar, so eg haldi at eg gevi henni telduna. Eisini hóast hon helst heldur vildi vunnið ferðina, sum verður at vinna í mai mánaði, sigur Bergur.

Men tað eru jú ráð fyri tí eisini. Halda hann og konan á fram at loysa uppgávurnar, sum eru í Sosialinum, so kunnu tey jú eisini vera við í rúgvuni, tá vinnarin fyri mai-mánað verður drigin.



*Bergur Stórhamar stendur her við spildunýggju farteldunni.*

BURGER KING

Starvsfólk
**TIL BURGER KING Í SMS**

**FULLA TÍÐ OG AFTANÁ SKÚLATÍÐ**

Søkt verður eftir fólki M/K sum er 18 ár ella eldri, til fulltíðar arbeiði, og eftir fólki sum er 16 ár ella eldri til arbeiði aftaná skúlatíð. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar tær væl at arbeiða har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir, og eftir hetta kanst tú gerast eitt av álitisstarvsfólkum okkara. Vit gleða okkum til at hoyra frá tær...

**SEND UMSÓKNINA TIL**

Burger King, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn. Ella far inn á sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal.



Sosialráðgevarar
til Norðoya deild

Á Almannastovuni arbeiða umleið 100 fólk, harav 5 starvast á økisdeildini í Norðoyggjum.

Hevur tú hug at royna teg í fjølbroyttum, avbjóðandi starvi í einum arbeiðsumhvørvi, sum er í støðugari menning? So er hetta nakað fyri teg. Á deildini hjá Almannastovuni í Klaksvík eru eitt fulltíðarstarv og eitt ¾ tíðar starv sum sosialráðgevari leys at søkja.

Nærri fæst at vita um størvini við at senda sær til Jóan Hendrik Svabo Samuelsen, deildarleiðara, tel 457240 ella við at fara inn á heimasíðu okkara: almannastovan.fo ella á portal.fo.
Umsóknarfreistin er 22. mai 2006.

almannastovan
www.almannastovan.fo